


**_Nr. 19_** **_12. september 2021_** **_81. árg._**

# Bønaverðin

*Eivind Frøen*

„Tá ið tú biður, ert tú tá greiður yvir, hvønn tú biður til? Tú biður til hann, sum hevur skapt universið. Hvat biður tú um? Biður tú um smálutir, ella biður tú um heimspartar?“ spurdi hann, sum stovnaði Navigatørerne. Tá fór eg undir at biðja soleiðis: „Harri, brúka meg, brúka okkum ungu at gera ein stóran mun í landi okkara!“

Vit skuldu jú biðja til ein stóran Gud, og nú fóru vit undir at hava bønamøti í okkara íbúð kl. 6 á morgni, og íbúðin bleiv full. So fluttu vit bønamøtini heim til foreldur míni í Oslo. Tey høvdu tvær stórar stovur, og har gjørdist eisini fult. Tað bar á, at fólk ringdu upp á dyrnar og spurdu: „Er tað her, tit biðja?“

Hetta var í endanum av 1960-árunum, og eg meti, at úrslitið av hesum var tað, sum hendi seinni, tá ið vit byrjaðu „Ungdom i oppdrag“.

Summi halda, at bøn er keðilig og strævin. Men skulu vit bara gera tað, sum er stuttligt? Eg hugsi, at tað er tí, at vit biðja í einum ávísum formi. – Eg minnist, at fleiri ár seinni var eg á Hawaii á einum skeiði fyrst í 1970-árunum. Loren Cunningham var har. Vit høvdu bønabólkar. Tá gjørdu vit nakað, sum kanska er óvanligt her hjá okkum. Okkara bólkur setti seg í ein runding og bað: „Gud, minn okkum á tað, sum tú vilt, vit skulu biðja fyri!“ Ofta so biðja vit: „Gud, gev mær og mínum hetta og hitt!“

So fóru vit undir at biðja, og brádliga kom eitt orð í heilan á mær: Ísland. Eg kendi einki til Íslands, hevði ongantíð verið har. Eg nevndi tað fyri hinum, og vit fóru undir at biðja.

Brádliga var tað, sum vindur kom undir bønaveingirnar, tað lætnaði, tað var uppdrift. Vit bóðu um ymisk ting í Íslandi. Vikuna eftir kom aftur navnið Ísland til okkara. Vit bóðu í tveir mánaðir fyri Íslandi. Beint áðrenn eg skuldi fara heim aftur til Noregs, fái eg boð frá einum vinmanni har heima. Hann spyr meg: „Tá ið tú nú skalt flúgva úr USA, kanst tú so ikki steðga á í Íslandi, tí eg havi fingið samband við ein ungdóm har?“ Eg broytti ferðaseðilin og lendi í Keflavík. Teir tóku væl ímóti mær, og eg møtti fleiri, sum eg visti, at eg hevði biðið fyri. Eg kendi samanhangin aftur, sum Gud hevði víst okkum gjøgnum bønina.

Men eitt, sum teir ikki høvdu, var ein venjingarskúli, har tú lærir upp ungdómar at fara út at evangelisera. Men eini 7 ár seinni var eg boðin aftur at undirvísa á hesum skúlanum. Tað var nakað serligt, tá ið eg stóð á talarastólinum og sá út yvir henda ungdómsflokkin, sum vildi gerast Jesu lærusveinar, tí tá kundi eg siga: „Eg havi biðið fyri tykkum fyri fleiri árum síðani á einari aðrari oyggj í Atlantshavinum. Hetta vísir okkum nakað av kraftini, styrkini og víddini í bønaverðini.

*Effie Campbell.*

# Guds gáva til tín

Í Efesusbrævinum 2,8–9 stendur: „Tí av NÁÐI eru tit frelstir við TRÚGV, og tað er ikki tykkum at takka, tað er GUDS GÁVA, IKKI AV GERNINGUM, fyri at eingin skal rósa sær.“

Rómverjabrævið 3,26 sigur, at „GUD RÆTTVÍSGER tann, sum hevur TRÚGV Á JESUS!“ Og vers 28: „… at menniskjan verður RÆTTVÍSGJØRD av TRÚGV – uttan lógargerningar.“

Umsett til gerandisdagin merkir tað: Tá ið eg havi mín besta dag, eri eg ikki rættvísgjørd vegna ein væleydnaðan dag við góðum gerningum. Eg eri rættvísgjørd við trúnni á Jesus vegna tað, sum Hann gjørdi á krossinum.

Og á mínum versta degi eri eg ikki minni rættvís vegna tað, at mínir tankar, míni orð og mínar gerðir eru ósømilig og illavorðin. Eg eri líka rættvís á mínum versta degi – sum á mínum besta degi.

Tí MÍN RÆTTVÍSI hevur einki við meg at gera – men alt at gera við JESUS.

Jesus rópti: „Tað er fullgjørt!“ (Jóh. 19,30). Jesus hevur gjørt alt, og eg sigi: „Takk Jesus, at tú eisini doyði fyri meg, at tú reis upp fyri meg, at tú hevur gjørt meg rættvísa, og at tú eisini kemur eftir mær!“

*Effie Campbell* umsetti.

# Til Grønlands

Tíðliga í 20. øld vóru tvær vekingar í Heimamissiónini, ein í 1930 og hin í 1950. Vekingar koma líka sum í aldum, í fyrstuni eru nógv fólk við, men sum frá líður, fella fleiri frá. Tá gleðist heimurin og spottar.

Ein maður, sum bleiv frelstur í vekingini í 1950, fall frá og fall til drukk. So fór hann til skips. Teir skuldu til Grønlands. Meðan teir sita niðri í lugarinum, fara menn at spotta tað andaliga. „Ja, øll, sum hava reist seg upp at vitna, hvar eru tey nú? Teirra lív er eingin vitnisburður. Tey liva akkurát sum vit onnur, har er eingin munur.“

Hesin fráfalni maðurin fekk so ilt av hesum. Hann kendi, at hann hevði kastað skomm á Jesus og hansara frelsuverk og givið heiminum høvi at spotta. Hann segði sjálvur seinni, at Harrin gav sær kraft, so hann reisti seg upp har í lugarinum og segði: „Eitt kann eg siga tykkum, **Jesus hevur ongantíð svikið meg. Tað eri eg, sum havi svikið Jesus!**“

Nei, Harrin svíkur ongan. Tað, sum heimurin ger skeivt, er, at tey festa síni eygu upp á tey trúgvandi. Eyguni skulu festast upp á Jesus!

„Menniskjusonurin er komin at leita upp hitt farna og bjarga tí.“ Luk. 19,10.

*Effie Campbell.*

# Lykilin

Vit bíða IKKI eftir næsta tíðindafundi fyri at finna okkara VÓN. Vit hava hana longu, um vit brúka tíð saman við HONUM, sum ER VÓN okkara – og sum ER FRIÐUR og HVÍLA okkara.

Jesus sigur í Matt. 11,28: „Komið higar til mín ØLL tit, sum arbeiða og ganga undir tungum byrðum, og eg vil geva tykkum HVÍLU.“ Lykilin til hasa hvíluna eitur: „KOMIÐ TIL MÍN!“ Tað vil siga, at vit mugu velja okkurt annað frá fyri at

kunna velja at brúka tíð saman við Gudi í kvirru, í Orðinum, í takkargerð, bøn, lovsongi, tilbiðjan og at lurta.

NÝGGJA kraft – NÝGGJA hvílu – NÝGGJAN frið – NÝGGJA gleði – NÝGGJAN íblástur – NÝGGJA náði – NÝGGJA fyrigeving – NÝGGJAN kærleika o.s.fr. fáa tey, sum bíða eftir Harranum – og tey fáa nýggjar veingjarfjarðar sum ørnin (Jes. 40,28–31).

So brúka handa LYKILIN hvønn dag. Jesus hevur givið tær hesi trý orðini: „KOMIÐ TIL MÍN!“ Lat hetta ikki vera ein lykil, sum liggur goymdur í einari skuffu, men brúka hann hvønn dag. Betri tilboð fært tú ikki.

*Effie Campbell* umsetti.

# Halt veg tín reinan

Ein norsk kona fekk vitjan úr Amerika. Tað var systir mannin, og hon var trúgvandi. Ein dagin, tá ið tær sótu og prátaðu, spyr gesturin hesa norsku: „Hví ert tú í grundini ikki frelst?“

„Tað er tí, at eg síggi, hvussu tey, sum kalla seg frelstan, bera seg at, og tann atburðin líkar mær ikki. Tey eru ikki petti øðrvísi enn vit onnur.“

„Tú, tað er ikki okkara uppgáva at døma tey, tað skal Gud sjálvur gera. Okkara uppgáva er at halda veg okkara reinan. „Hvussu skal hin ungi halda veg sín reinan? Við at **halda seg eftir orði Tínum**,“ lesa vit í Sálmi 119,9 V.D., og tað er okkara uppgáva.“

Henda norska hevði lagt til merkis, at hin hevði eitt so inniliga tætt samband við Jesus. Tá ið hon t.d. turkaði dustið burtur inni í stovuni, gekk hon og smáprátaði við Jesus. Hetta hevði havt sovorðna ávirkan á hana, at tá ið hin spurdi: „Íðan, vilt tú verða frelst?“ tók hon av í stundini, og tað valið hevur hon ongantíð angrað, tvørturímóti.

*Effie Campbell.*

---

**Bondevig:** Kristintrúgv er tað sama sum Kristus-trúgv.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 12. sept. | Tekstur: | Matt. 6,9 Jes. 6,1–7 | bíbliuorð: | Fil. 4,6 |
| 19. sept. | Tekstur: | Matt. 6,10a; 13,4–9 + 19–23 | bíbliuorð: | Mark. 1, 15a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




***Nr. 20*** ***26. september 2021*** ***81. árg.***

# Tú ert góðtikin, elskað og trygg

*„Sjálvur andin vitnar saman við anda okkara, at vit eru Guds børn.“ Róm. 8,16.*

Um tú ert ættleidd, merkir tað, at foreldur tíni valdu teg. Tey kundu havt valt eitt annað kyn ella ein annan lit. Men tey valdu TEG.

Kanska sigur tú: „Men um tey høvdu kunnað sæð restina av lívi mínum, høvdu tey kanska broytt meining.“ Tað er júst kjarnin!

Gud sá alt lív okkara frá byrjan til enda, og hann var kortini vísur í tí: „Við tað at hann frammanundan í kærleika ætlaði okkum til at hava barnakor hjá sær sjálvum fyri Jesu Krists skuld, samsvarandi góðtokka vilja síns.“ (Ef. 1,5). „Tit fingu sonarættaranda (barnakor), sum vit rópa í: Abba, faðir! … Men eru vit børn, tá eru vit eisini arvingar, Guds arvingar og Krists samarvingar.“ (Róm. 8,15 og 17).

Gud góðtekur teg ikki vegna tína ættartalvu. Og Hann vísir tær ikki burtur vegna tín hjúnaskilnað, tíni lýti, tína skuld ella tíni býttisligu val. Tú ert Hansara endurloysta barn. Tú kanst kalla Hann „Abba“, sum merkir „pápi“ ella „babba“. – Í Honum og við trúnni á Hann hava vit dirvi og atgongd til Gud.“ (Ef. 3,12).

Og soleiðis er tað – bæði tínar ringu og tínar góðu dagar. Og tað verður betri so satt sum tú trýrt á Jesus og hevur bjóðað Honum inn í hjarta títt. Tín ættleiðing er vatnrætt eins væl og loddrætt. Tú ert limur í Hansara endurloystu familju. Sundur-

farnir, fíggindaligir múrar verða niðurbrotnir, og felagsskapur verður stovnsettur, tí vit hava ein felags pápa. Brádliga hava vit familju um alla verðina!

Um Gud elskar teg, **mást** tú verða verd at elska. Um Hann vil hava teg í ríki sínum, **mást** tú vera verd at hava har. Guds náði bjóðar tær – nei, **krevur av tær** – at broyta tína áskoðan á teg sjálva, hyggja gjøgnum Guds eygu og koyra burtur kenslur, har tú heldur, at tú ert burturvíst og óverdig. Tú ert góðtikin, elskað og trygg!

*„… et Ord til Dagen"* – *Effie Campbell* umsetti.

# Kamarskrókurin

***Lag:** Egið lag **el.** Sælasta vissa.*

**1.** Í kamarskróki – niðri á knæ,
har er mítt fasta, heilaga stað –
møti eg Jesus' í hansar' Bók.
Blóð hans burt synd og skomm mína tók.

***Kór:*** *Mín kamarskrókur – heilaga stað,*
*har tú ert nær, og eg gerist glað,*
*har tú mær gevur megi og mátt,*
*har eg kann njóta samfelag gott.*

**2.** Mong henda krókin heilt gloyma vekk,
stríða og streva – illa tó gekk,
hugsa ei um, hvat Gud hevur sagt:
*„Ikki við herróp', ikki við makt!"*

**3.** Far í títt kamar, dvøl eina stund,
gripir tú fært, gerst lættur í lund,
gullið er goymt, men bið, bara bið,
skattir tú finnur – og sælan frið.

**4.** Ert tú mótfallin, tungur í sinn',
kvika tær, far í kamar títt inn,
sorg verður sangur, tú fært nýtt mót,
um tú nú trýrt og nígur í bót.

*Effie Campbell* umsetti.

# Myrtukransurin

Í einari veking hjá Heimamissiónini fyri mongum árum síðani var tað ein ung kona, sum bleiv umvend. Hon helt fast við Harran alt sítt lív og var eitt brennandi vitni fyri hann.

Tá ið henda konan á ungdómsárum bleiv gift, hevði hon ein myrtukrans um høvdið. Fyrr høvdu fólk eina kistu, har tey goymdu ymiskt, sum hevði virði fyri tey, eitt nú høgtíðsklæði.

Tá ið hon sum gomul kona ein dagin skuldi fara í kistuna at leita eftir onkrum, kemur hon fram á myrtukransin, sum liggur niðri á botni í kistuni. Har hevur hann ligið frá tí, hon var blaðung. Hon hyggur við, tí hvat sær hon: myrtukransurin blómar. Hetta var rættiliga sjáldsamt, og tankar okkara leita aftur til tann turra stav Árons, sum blómaði í sáttmálaørkini. Hann var bæði grønkaður, bar bløð, blómur og stadnar mandlur vuksu á honum. 4. Mós. 17,8.

Nakað eftir hetta kemur prestur at vitja. Konan vísir tá presti myrtukransin, sum blómar. Hon spyr prest, hvussu hetta skal tulkast. Hann hyggur upp móti himli og stendur stillur eina løtu, so sigur hann: „Tá ið tú doyrt og kemur til Himmals sum brúður Krists, tá setur Harrin Jesus, tín brúðgómur, ikki ein myrtukrans á høvur títt, men eina krúnu aftur fyri, at tú í trúfesti hevur tænt honum eitt langt lív.“

*Effie Campbell.*

## Lønin, sum verður býtt út, er fimm ymiskar krúnur

1. **Sigurskransur** – krúnan hjá teimum, ið sigra. *(1. Kor. 9,25).*
2. **Lívsins krúna** – krúnan hjá teimum, sum lata lív sítt fyri Jesusar skuld. *(Opb. 2,10).*
3. **Hin ófølnandi kransur dýrdarinnar** – krúna hjá leiðaranum fyri kirkjuliðinum. *(1. Pæt. 5,4).*
4. **Rættlætiskransurin** – til tey, sum hava glett seg til komu Harrans. *(2. Tim. 4,8).*
5. **Heiðurskransurin** – krúnan hjá teimum, sum vinna sálir fyri Harran. *(1. Tess. 2,19).*

Ofta ljóðar spurningurin: „Eru vit ikki sjálvgóð at arbeiða fyri at fáa løn?“ Nei, so avgjørt ikki! Gev tær far um, at ein dag vilja krúnurnar hjá øllum teimum trúgvandi verða lagdar niður fyri Kristi føtur. Opb. 4,10 Æran er hansara! Vilt tú hava eina krúnu at geva Jesusi, ella skal æra hansara líða undir tí, at tú onga krúnu hevur at leggja niður fyri føtur hansara?

*E. Campbell* umsetti.

# Du, der ude i gangen

Fyri mongum, mongum árum síðani vóru vekingarmøti í einari bygd í Eysturoynni. Salurin var fullur, og gongin var eisini stúgvandi full. Trúboðarin, sum var dani, sigur brádliga av talarastólinum: „Du, der ude i gangen, du må vende om, ellers går du fortabt.“

Ein maður, sum stóð har, vendi sær á og fór til hús fúkandi óður. Tá ið hann kemur inn, sigur hann við konuna: „Hatta er frekasti maður, sum eg havi møtt!“

Konan svarar aftur: „Hvussu veitst tú, at hann meinti við teg? Gongin var jú full av fólki!“

„Jú, tí hann hugdi beint upp á meg! Men tú ert líka dán sum hasin maðurin. Tú heldur við honum!“

So tók hann leypin og fór eftir torvi fyri at svala á sær. Men jú longur hann kom niðan gjøgnum ta brøttu brekkuna, jú móðari gjørdist hann. Tá fall hann á knæ og gav Jesusi hjarta sítt. Og hann gjørdist so ómetaliga glaður. Hann kom til hús aftur við torvinum og strálaði av gleði.

*Effie Campbell.*

---

Gud dømir í kærleika, menniskju døma í skaðafrøi.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 26. sept | Tekstur: | Matt. 6,10b; 26,36–39 | bíbliuorð: | Sl. 37,5 |
| 3. okt. | Tekstur: | Matt. 6,11+33 2 Mós. 16,1–36 | bíbliuorð: | 6,33 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74